**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 0608**
**Tíðarskeið 15/02-22/02-2006**

---

**Fólk frá FRS.:** Arnold K. Henriksen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2 glúpur, termistorketan og ein ADCP mátari.

**Um túrin:** Vit fóru út mikudagin 15/02 kl.2100. Siglt varð eystur á støð N1, har vit byrjaðu skurðin og tóku støðirnar norðureftir. Á positión NWNB, løgdu vit ein ADCP streymmátara út og hildu so áfram norðureftir.
Frá skurði N sigldu vit vestur á støð V19 á skurði V, vit tóku skurðin frá Føroyabanka og inn á landgrunnin. Frá skurði V varð siglt suðureftir. Vestanfyri Suðuroy tóku vit eina støð við termistorketuni. Haðani varð farið á skurð S og tóku vit hendan skurðin av Munkagrunninum og móti Hetlandi.
Siglt varð so norður á støð E8 og tóku vit hendan skurðin frá markinum og inn ímóti Nólsoynni.
Vit fóru nú inn á Toftir eftir kassum og ísi, til næsta túr.
Tá hetta var liðugt, varð farið út aftur at taka støðir við termistorketuni. Vit byrjaðu á Svínoyarvík og tovaðu eystureftir. Ein støð varð eisini tikin innyvir, í sama umráði.
Alt riggaði, sum tað skuldi, og alt gekst væl Veðrið var stak gott hendan túrin.
Vit vóru aftur á Havnini týsdagin 15/11 kl. 0700.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 51 støðir og saltprøvar á 48. Vit tóku eisini prøvar til lagring. Við WP2 glúpinum tóku vit 51 støðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í vár.

**Viðmerkingar:**

21-02-2006 ______________________
Regin Kristiansen

Vend




Støðir og kósir á túri 0608